# Venjingarhølið er savningarstað

**Nýinnrættaða motiónsrúmið á sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn fer serliga at fáa týdning fyri tey, sum steðga leingi á hotellinum**

Randi Jacobsen

Sjúklingar og avvarðandi teirra, sum gist á sjúklingarhotellinum Tórshavn í Keypmannahavn, eru so smátt farin at kunna seg við venjingartólini.

Í næstum fáa tey eina veruliga kunning um, hvussu tólini kunnu brúkast.

– Ein føroysk kvinna, sum lesur til fysioterapeut, hevur ringt og spurt, um hon saman við tveimum øðrum kann koma higar at gera uppgávu um hesa tænastuna, sigur Marita Bau, sjúkrarøktarfrøðingur og varaleiðari á sjúklingahotellinum.

Komandi fysioterapeutarnir fara tá at vísa, hvat alt tað ymiska kann brúkast til, og tað fer óivað við sær, at áhugin fyri venjingini fer at vaksa, væntar Marita Bau.

Hon heldur tað av fleiri orsøkum vera gott at hava eitt slíkt venjingarrúm á hotellinum.



*Rennimaskinur og onnur tól eru í venjingarhølinum*

## Gott fyri alt

Eitt er, at tað er gott fyri øll at røra seg, men nógv steðga leingi, og fyri tey kemur væl við at hava okkurt at takast við. Tað er í sær sjálvum einki hugaligt at fara til Danmarkar í sjúkarørindum.

– Serliga hugsi eg um tey, sum eru einsamøll her, tí her kunnu fólk vera saman. Sjálvt um Føroyar eru eitt líti land, er tað ikki so, at allir føroyingar kennast. Fyrr høvdu fólk tað stuttligt í roykirúminum. Roykirúmið er gjørt um til venjingarrám, har tey nú kunnu hava tað stuttligt.



*Marita Bau, varaleiðari heldur tað vera gott, at sjúklingar og avvarðandi aftur hava fingið eitt stað, sum tey kunnu hava tað stuttligt saman*

# Trýsta skuldina niður

**Kommunustýrið á Sandi leggur nógva orku í at gjalda ovurstóru skuldina niður. Næsta ár skal kommunan gjalda umleið 3,5 mió. krónur í rentum og avdráttum, og tað nýtur við 13 mió. krónum í skattainntøku**

Randi Jacobsen

Skuldin hjá Sands kommunu er umleið 21 mió. krónur, og tað svarar til næstan tvær álíkningar.

Brandur Sandoy, borgarstjóri sigur, at skuldin nú verður umfíggjað, men samstundis tekur kommunan eitt ódnartak fyri at minka um skuldina.

Skattainntøkan hjá kommununi næsta ár er mett til 13 mió. kronur, sum er sama upphædd sum í fjør.

Av teimum skal kommunan gjalda umleið 3,5 mió. krónum í avdráttum og rentum.

– Skuldin er ein tung byrða, men tað skal ganga, sigur Brandur Sandoy.

## Summarhúsøki

Hóast stóra skuld er rúm á fíggjarætlanini fyri nýggjari íløgu, sum verður eitt summarhúsøki.

Økið, sum lagt er av til summarhúsøki, liggur Handan Hamralíð, uttan fyri bygdina yvir móti Grótshúsvatni.

Brandur Sandoy sigur, at kommunan hevur fingið onkrar frispurningar um grund at byggja summarhús á.

13 grundir verða útstykkjaðar á sethúsaøkinum, og stykkini verða seld óplanerað.

## Rindar skúlaskuld

Skúlasambandið í oynni hevur samtykt at leggja nýtt graslíki á vøllin við Meginskúlan, men treytin er, at Sands kommuna rindar sína skuld til skúlan. Skuldin er hálv onnur millión, sum kommunan nú fer at gjalda, men harfyri er ikki ætlanin at tyngja um lánibyrðuna, sigur Brandur Sandoy.

## Bíligari barnaansing

1. januar í ár fór barnagarðurin á Sandi frá at vera sjálvsognarstovnur til kommunalan stovn.

Brandur Sandoy sigur, at í ár eru gjørdar stórar sparingar á stovninum. Sparingarnar hava havt við sær, at leiðarin helt tað vea ráðiligt at lækka foreldragjøldini fyri barnaansing.

Og tað samtykti kommunustýrið á fundinum mikukvøldið at gera.



*Summarhúsøkið verður uttan fyri bygdina yvir móti Gróthúsvatni*

Frá 1. januar fer heildags vøggustovupláss at kosta 2275 krónur, hálvdags 1275 krónur.

Heildags barnagarðspláss frá at kosta 1900 krónur, hálvdags 1050 krónur.

Kostnaðurin fyri frítíðarskúlapláss verður 1000 krónur.

Gjøldini eru sera ymisk frá kommunu til kommunu. Gjøldini á Sandi liggja nú í miðuni av, hvat foreldur í ymisku kommunum gjalda, sigur Brandur Sandoy.